

# Lægsti oljuprísur í seks ár

Deil:

**Jan Müller**

27.01.2015 - 10:10

Oljan.fo

Í morgun gjørdist greitt, at oljuprísurin hevur ongantíð verið so lágur seinastu seks árini. Hetta hendir hóast stjórin í tí máttmikla OPEC í gjár ávaraði um, at prísurin kann røkka 200 dollarum fyri tunnuna, um ikki íløgur í framleiðslutólini verða varðveittar.

Ávaringin kom frá aðalstjóranum í OPEC, Abdalla El-Badri, men marknaðurin tók sær ikki tikni av úttalilsunum hjá oljustjóranum. Tað vísir, at OPEC hevur minni og minni ávirkan á marknaðarstøðuna.

"Veitingarnar eru framvegis høvuðspurningurin. Vit eru noydd til at minka framleiðsluna. Og møguleiki er framvegis fyri, at prísurin fer at lækka enn meira uppá stytri sikt. Eftirspurningurin fer ikki at vaksa orsakað av teimum fallandi prísunum, og tað fer at

ganga tíð, áðrenn tað hendir," sigur rávøruráðgevin David Lennox frá Fat Prophets í Sydney við Bloomberg sambart Ritzay Finans.

Týsmorgun er oljuprísurin 48,30 dollarar.